## DAGSINS MEINING

# KT vinnan

Í næstu viku verður KT-stevna í Norðurlandahúsinum. Kunningar- og samskiftistøkni er ein sera týðandi táttur í at kalla øllum pørtum av nútímanssamfelagnum. Vinnulív á sjógvi og landi, umsiting, peningastovnar, útbúgvingarskipanin og einstaklingurin - alt er meira ella minni tengt at kunningartøknini. Tann tíðin, tá ein telda var nakað sermerkt fyri serfrøðingarnar, er langt síðan farin aftur um. Kunningartøknin er nú ein natúrligur partur av gerandisdegnum hjá so at siga hvørjum einstøkum samfelagsborgara.

Ein vælvirkandi og vælútbygd KT vinna er ein sjálvsøgd fortreyt fyri einum vælvirkandi samfelag. Tað er tí av stórum týdningi, at Kunningartøknin stendur sterk innan útbúgvingarskipanina so væl sum í vinnulívinum. Kunningartøkni er ikki eitt mál í sjálvum sær men eitt neyðugt amboð og ein fortreyt fyri allari menning. Tað er tí neyðugt støðugt at dagføra og menna nýtsluna av hesum amboði. Hetta setir stór krøv til fólkaskúlan og til vinnu- og miðnámsskúlarnar. Hesi krøv kosta stórar peningaupphæddir, men tað fer at kosta meira, um vit ikki alla tíðina eru í fremstu røð á hesum øki serstakliga innan útbúgvingarkervið.

Føroysk KT hevur verið í støðugari menning. Vinnan hevur staðið seg sera væl í kappingini við útlendskar fyritøkur og henda vinna hevur sýnt bæði áræði og dirvi til at ganga nýggjar leiðir. Kappingin frá stórum og sera peningasterkum útlendskum KT fyritøkum harðnar í hvørjum. Hetta skapar sjálvsagt trupulleikar fyri heimligu vinnuna. Í eini slíkari støðu er tað freistandi at avmarka kappingina við politiskum tiltøkum. Hetta kann eisini hjálpa eini trongdari vinnu eina tíð, men sum frálíðir gagna slík tiltøk ikki eini vinnu í harðari kapping. Vit kunnu vísa til skipasmiðjuídnaðin í útlandinum t.d. í Noregi, sum stóran almennan stuðul ikkii stendur seg ikki í kappingini við útlandið.

Føroyska KT vinnan er noydd til at brynja seg til kappingin, og henda vinna er noydd til at sjálv at taka kappingina upp við útlendsku kappingarneytarnar. Tað almenna eigur ikki við politiskum tiltøkum at leggja seg út í kapping á vinnuøkjum og sostatt heldur ikki á KT økinum. Hinvegin eigur tað almenna at ansa væl eftir, at einki verður gjørt, ið kann skaða føroyska KT vinnu. Hartil er tað sjálvsagt, at hitt almenna stuðlar við at seta mennandi karmar um KT vinnuna eitt nú við útbúgving og mennandi vinnulóggávu á ymsum økjum. Føroyska KT vinnan er so væl fyri við atliti at kapitali, førleikum, starvsfólki og útgerð, at vit ivast ikki í, at vinnan fer at standa seg í kappingini við útlendsku fyritøkurnar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tunnilsverkætlan Skálafjørður-Tórshavn

**Alfred Olsen**
*løgtingsmaður*



Eg fegnis um, at Landsverkfrøðingurin í bløðunum mikudagin, boðar frá, at hann ikki mótarbeiðir tunnilsverkætlanini millum Skálafjørðin og Tórshavn. Hinvegin vóni eg, at LV við síni stóru vitan, framyvir kemur at luttaka aktivt í hesi spennandi og nýskapandi tunnilsverkætlan.

### Vega- og tunnilsætlanin hjá Landsverkfrøðinginum

Í blaðgreinini sigur Landsverkfrøðingurin, at teir hvørki hava arbeitt ímóti tunnilsverkætlanini ella gjørt eina vega- og tunnilsætlan í Suðureysturoy.

Men veruleikin er tann, at Landsverkfr. hevur gjørt eina vega-, brúgva- og tunnilsætlan fyri Suðureysturoy, sum teir hava fundast við Sjóvar-, Skála-Runavíkar- og Nes kommunur um.

Tunlar og vegir í hesi ætlan eru:

Tunnil millum Skálafjørðin og Selatræð. Undirsjóvartunnil millum Saltnes og Strendur og ein undirsjóvartunnil millum Morskranes og Signabø.

Vegaætlanirnar gingu millum annað út uppá, at gera veg frá tunlinum á Selatræð og suður til Morskranes og frá Raktanga norður til undirsjóvar-tunnilin millum Morskranes og Signabø.

### Brúgvin

Ætlanin innihelt eisini eina stabbabrúgv tvørtur um Skálafjørðin, sum eina møguliga betri loysn enn undirsjóvartunnilin, men fyri at koma til brúnna, skuldi ein landsvegur við einum fríøki uppá 30 metrar til báðar síður, gerast úr Runavíkini og gjøgnum eitt tað besta útstykkingarøkið til sethús v.m. á Skálafjørðinum, sum er á eystursíðuni á Høganesi, út til brúnna millum Saltnes og Strendur.

### Undirsjóvartunnilin Skálafjørður - Tórshavn

Men veruleikin var tann, at verkætlanin um ein undirsjóvartunnil millum Skálafjørðin og Tórshavn, als ikki var tikin við í ætlanunum hjá LV. sjálvt um bæði landsverkfrøðingurin og landsstýrismaðurin vóru við tá henda verkætlanin var løgd fram og fingu eintak av ætlanini.

Men hóast hetta, so gekk øll verkætlanin hjá landsverkfrøðinginum einans út uppá, at ferðsluna úr Eysturoynni skuldi leggjast yvir Signabø og har-frá víðari.

Hetta var orsøkin til, at eg loyvdi mær at siga, at landsverkfrøðingurin mótarbeiddi verkætlanini um undirsjovartunnil millum Skálafjørðin og Tórshavn.

### Keðiligar avleiðingar

Ætlanin hjá landsverkfrøðingum hevur nógvar óhepnar fylgir við sær. Brúgvin hevur óhepnar fylgir fyri umhvørvið umframt framtíðar nýtslu og marknaðarføring av Skálafjørðinum, sum oljuhavn v.m.. Vegaføringin hevur sera óhepnar fylgjur fyri útstykkingina undir Høganesi. Undirsjóvartunnilin millum Saltnes og Strendur er ikki lagdur rætt. Neyðugt atlit til umhvørvið er ikki tikið við. Nýtsla av grótinum úr undirsjóvartunlinum til ídnaðarøkir v.m. við brúgvaprojekti hvørvur, og soleiðis kundi eg hildi fram.

Men ætlanin hjá Landsverkfrøðinginum manglaði totalt tað fíggjarliga atlitið, tí bæði í samband við íløgu og rakstur vildi ætlanin viðføra eina fíggjarlig útreiðsla fyri landskassan.

Mótvegis hesum verður tann privata undirsjóvarverkætlanin millum Skálafjørðin og Tórshavn, fíggja uttan fyri landskassan og raksturin geva yvirskot, tí ferðslan verður so nógv og gjaldið lágt, umframt at tíðarsparingin hevði verið millum 30 og 60 min. hvønn vegin.

### Nýhugsan

Tí gleðir tað meg, at landsverkfrøðingurin nú alment boðar frá, at hann ikki mótarbeiðir tunnilsverkætlanin og eg vóni, at stovnurin framyvir kemur at luttaka positivt í hesi nýhugsandi verkætlan, sum vísur á nýggjar fíggingar- og rakstrarmøguleikar, ið eru uttan fyri landskassan, og sum avgjørt eiga at vera royndir.

# Kollafjørður: Inni í Firði og úti í Firði

**Øssur av Steinum**

Síðan Kollafjørður gjørdist partur av Tórshavnar kommunu eru fleiri nøvn sett á gøtur, vegir og býlingar í bygdini. Alt gott um hettar, men í alt ov nógvum førum eru hesi nøvn sett við ongum skili og eru tí beinleiðis missvísandi.

Vit hava t.d. hugtøkini inni í Firði og úti í Firði. Her meinast ikki við nakað ávíst stað, men partar av bygdini.

Tá menn í byrjanini av fimti árunum tosaðu um at fáa bygdini eitt bygdarhús, varð dúgliga tosað um, hvar hetta húsið skuldi standa. Semja fekst um, at tað hvørki skuldi vera inni í Firði ella úti í Firði.

Hulduvíkin varð vald og Wenzel Djurhuus, Wenzel á Heyggi, biðin um at lata grundstykkið.

Nú er inni í Firði gjørt til eitt staðarnavn av Ósabakka og heilt fram at Barðgili (Rólvi Djurhuus), hóast mong staðarnøvn eru her. Býlingasavnið á Heyggi er burtur. Langasandur er nú víðkaður, so hann tekur við á Ósabakka og røkkur heilt út at Kópasteini, og soleiðis kundi ein hildið fram at nevnt mistøk/skeivleikar við navnaásetingum í Kollafirði.

Til síðsta løgtingsval lýsti Tórshavnar býráð við, at fólk í Kollafirði, Signabø og Oyrareingum valdu har og har. Hvat er hetta fyri nakað?

Annaðhvørt verða allir býlingar í bygdini nevndir ella eingir. Vit sum búgva her eru jú øll kollfirðingar, líka mikið hvar í bygdini vit so búgva. Ein kann loyva sær at spyrja, um eitt býráð uttan orð ella eið hevur loyvi at broyta adressu hjá fólki?

Eg havi t.d. í mong ár búð á Ósabakka, men nú skal hetta ikki longur vera so, men inni í Firði.

Síggi, at fólk eru farin at fáa sær navnabrettir á húsini, tí tey eru tikin av ræði. Hetta er væl skiljandi, tí við hetta lag eru um nøkur fá ár mong av okkara vøkru staðarnøvnum burt-

*Framhald á síðu 11*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Hevur Gundadalur enn ein møguleika?

### Kávalæti førdi eina góða ætlan út í óføri

**Ólavur Hátún**



Málið um Gundadal og Tórsvøll hevur tvinnanda aspektir:

1) Ein prýðilig ítrótta- og frítíðarverkætlan, sum professionellir byggilistarmenn eftir áheitan høvdu fingið í lag eftir drúgvar samráðingar við allar hugsandi áhugabólkar, bleiv rend um koll. Fylgjan av hesum:

a) Møguleikarnir til eitt sunt og gott frítíðarlív í Gundadali vórðu skerdir.

b) Frælsi ítrótturin fekk ikki sínar ætlaðu umstøður til at menna seg í Føroyum.

c) Føroya eru settar uttanfyri at kunna hýsa Oyggjaleikunum og fult og heilt vera við í hesum kappingum millum oyggjalond, har vit natúrliga hoyra heima, og har vit eftir øllum sólarmerkjum høvdu staðið okkum væl.

2) Á ódemokratiskan hátt og við lítið heiðurligari framferð fekk privatpersónur høvdið fyri seg hjá ráðandi myndugleikum at fremja áhugamál hjá sær sjálvum og einum rættiliga avmarkaðum áhugabólki fram um eina samfelagsrelevantari heildarætlan.

Fyri at kunna fremja hetta verk hevur fremsti framherji hjá hesum bólki, ein fyrrverandi virdur borgarstjóri, yvir fyri almenninginum borið fram ósannar grundgevingar. Dømir:

a) Í sínari grein m.a. í Dimmalætting 1. april (!) leggur Poul Michelsen **plásstrot** í Gundadali til grund fyri, at hann hevur útihýst frælsa ítróttinum av økinum, sum var ætlað hesari ítróttagrein. Eftir altjóða krøvum mátti vøllurin breiðkast frá 65 m og upp í 68 m, sigur hann, og rennibreytin mátti tí verið smalkað niður í 6 breytir. Fakta: *Eftir uppruna Tórsvallarætlanini var fótbóltsvøllurin 68 m*, og tú finnur valla stadion við 8 breytum í londum sum t.d. Danmark, Noreg ella Skotlandi.

b) Tá málið fyri 5 árum síðan bleiv tikið fram til almenna viðgerð, brúkti Poul Michelsen, sum sæst á eftirfylgjandi blaðsamrøðum, **fíggjarligar orsakir og tíðartrot** sum skoðsmál fyri at kunna útihýsa rennibreytini.

### Viðmerkingar til greinastubba

Í sínari svarheilsan til mín mikudagin 7. apríl unnir Poul Michelsen mær "*rætt til at hava eina aðra ráðfesting av, hvat føroyskur fótbóltur eigur at fáa í føroyskum ítróttahøpi*". Øllum man vera greitt, at hjá mær hevur tað frá byrjan einans verið umráðandi, at tað ikki í fótbóltsovurhuga skuldi verða beint fyri teim møguleikum, sum enn vóru til eitt fjølbroyttari frítíðar- og ítróttalív í Gundadali enn bara til fótbólt.

"*Argument røkka ikki longur...*". Trupulleikin er tann, at onnur argument enn tey hjá Poul Michelsen ongantíð eru sloppin framat hjá myndugleikunum. Sum ein býráðslimur tók til : "Málið Tórsvøllur hevur ongantíð fingið nakra veruliga politiska og fakliga viðgerð, har ymisk argument hava verið frammi".

Poul endurgevur mína útsøgn um, at hann eins og annar geykaungi tveitti allar byggilistamenninar burtur úr verkætlanini; men hann afturvísir hana ikki.

Her kemur tí mín fyrsti spurningur til Poul Michelsen: **Hví tókst tú ikki upp samarbeiði við arkitektarnar í staðin fyri at nýta títt ódemokratiskt íkomna vald til at geva teimum durafjórðingin?**

Poul hevur "**.. fingið nógvar positivar reaktiónir ...**" upp á sína skriving, sigur hann. Tað havi eg eisini fingið upp á mína, og eg havi neyvan møtt nøkrum havnarfólki, sum ikki harmast um, hvussu Gundadalur er viðfarin. Tað skuldi snúð seg um mentan og list; men úrslitið, sum nú stendur har, ber boð um alt annað.

"...*Raðfestingin at byggja ein alheims fótbóltsvøll í Gundadali er tað rætta mótvegis heildarnýtsluni....*" Eitt stadion við ongum atletikkumhvørvi, men við trimum fótbóltsvøllum, har tann eini og største liggur oyðin og tómur 360 dagar um árið, er tað nøkur heildarloysn?

"...*Tað er ikki rætt at samantvinna eitt fótbóltsstadion og eitt stadion til frælsa ítróttin ...*" Vøllir burturav til fótbólt finnur tú næstan bara hjá bóltfeløgum, sum hava fíggjarætlan sum okkara landsfíggjarlóg ella størri. - Flestu altjóða dystir, tú sært í sjónvarpinum, vísa kombinerað bólt- og atletikkstadion

Poul M.: "*Eg var sjálvur býráðsformaður, tá íløgurnar til byggibúgving, spreinging og laðing vórðu gjørdar, kendi væl grundalagið undir ætlanini og var tí á ongan hátt í fremmandum umhvørvi*". Ein og hvør kann spáka sær niðan í Gundadal og síggja, hvussu orka og samsvarandi íløga eru løgd í at runda byggilendið niðan móti svimjihylinum av til eina komandi rennibreyt. Tilvarandi steinseting varð løgd á í suðurendanum, eins og eisini aðrar fyrireikingar vóru gjørdar. Tí mín næsti spurningur til Poul Michelsen:

**Hvussu sampakka hesar eyðsýniligu fyrireikingar til eitt veruligt ítróttastadion við tína útsøgn, at tað hevur ligið í kortinum bara at byggja ein fótbóltsvøll aftrat í Gundadali?**

Poul vísir til sínar glæsiligu ætlanir á heimasíðu www.torsvollur.fo .

"Hattin av fyri Poul, fær hann hattar í lag!" kunnu vit siga í fyrsta viðbragdi, tá vit síggja hesar visiónir; men spurningar, sum beinavegin troka á, eru slíkir sum

1. Hvat skal okkara lítla samfelag, her tað ikki kann blíva talan um meira enn heilt fáar altjóða landsdystir um árið, við einum so ambitiøsum fótbóltsstadion, sum tú bert finnur makan til í størri býum, har slíkir vøllir eru í dagligari nýtslu?

2. Hví kroysta slíka eintáttaða fótbóltsætlan aftrat inn í Gundadal, sum líka væl kundi ligið so manga aðrastaðni í Suðurstreymi?

3. Hvussu kunnu menn nú fíggja slíkt ógvisligt projekt, sum áhaldandi høvdu tað sum grundgeving fyri ikki at fremja upprunaætlanina, at peningur kundi ikki skaffast til vega til so mikið sum at rudda burturfrá til eina rennibreyt?

Á heimasíðuni er eisini listi yvir sponsorarnar, sum stuðla Tórsvølli. Í uppriti til samtyktir fyri Grunnin Tórsvøll frá 24.06.98 stendur, at *grannskoðaður roknskapur fyri árið verður at liggja alment frammi í tíðarskeiðinum 1. apríl - 1. mai á hvørjum ári*. Tí hesir mínir spurningar til Poul Michelsen:

**a) Er tað so, sum ljóðar, at Tórsvøllur higartil hevur kostað 35 milliónir krónur?**

**b) Hvussu stórur partur av hesum gjaldi er almennur peningur, og hvussu nógv er fingið til vega aðrastaðni, eitt nú frá sponsorum?**

**c) Hvussu nógv fer liðugtgerð av Tórsvølli, sum tað verður nevnt á heimasíðuni, at kosta?**

**d) Hvussu sær tann fíggjarætlanin út?**

### Hvat segði Poul Michelsen, og hvat meinti hann?

Í sínum seinna greinastubba, sigur Poul Michelsen meg "*...leggja sær nakað í munnin, sum hann als ikki hevur sagt ella meinar ...*". Lat okkum hyggja at, hvussu bløðini hava endurgivið Poul:

Sosialurin 3. november 1998: "*Talan verður ikki um í fullum líki at útinna Tórsvallarætlanina .... Men tann ætlanin er ikki slept. .... triðja stigið verður frælsi ítrótturin. ... møguleiki verður fyri, at rennibreytirnar kunnu koma seinni. ... Tá peningur verður tøkur til at víðka økið, verða áskoðaraplássini flutt út á økið, sum tá kemur aftrat, meðan økið, har áskoðaraplássini í fyrstu atløgu verða, tá verður brúkt til rennibreytir.*

*... tað verður ikki mett ráðiligt, at raksturin kann bera meira enn tvær milliónir í lántøku (!).*

*.... Býráðið hevur játtað at stuðla við fimtan procentum - umframt tær sjey milliónirnar tað kostaði at gera økið soleiðis, sum tað liggur nú -, og landið hevur játtað 30 procent."* (Hvussu kundi tað tá grundgevast fyri, at býráðsins umboð Poul Michelsen skuldi hava dupult mandat og sostatt avgerðarrætt í 4-mannanevndini fram um t.d. landsins umboð?)

Dimmalætting 12. mars 1999: Poul endurgivin: *Hildið verður fast við uppskotið, ið kommunan kom fram við at byggja Tórsvøll stigvíst. ... Tá so avgerð verður tikin um, at nú eru ráðini til eina rennibreyt, so verður farið aftur um áskoðaraplássini og sprongt burtur úr berginum. Tá kunnu áskoðaraplássini verða flutt einar átta metrar eystureftir, og tá verður pláss fyri rennibreytini ... Sambært teknikarunum er tað onki problem...*

*Núverandi Tórsvallarprojekt kostar umleið 10 milliónir* (!)

Dimmalætting 8. mars 1999: Poul Michelsen: "*Einasta orsøkin til, at rennibreytin ikki verður bygd nú, er at fíggjarliga orkan ikki er nóg stór.*"

Sosialurin 21. mars 1999: Poul Michelsen: "*Í løtuni hava vit ikki pengar til spreingiarbeiðið...* (At hetta ikki var annað enn skálkaskjól kunnu vit allir, sum vóru á fundi um málið í Kommunuskúlanum 14. apríl 1999, vátta. Tann beistagerð, sum Poul Michelsen í tá eftirfylgjandi døgum framdi á Tórsvallarøkinum til tess at fyribyrgja, at rennibreytin fekk ein møguleika, tænir honum og hansara fylgisneyta Leivi Hansen til lítlan sóma). **...men um tað ber til at fáa hesar pengarnar til vega í ár, so ber til at taka elementini niður í heyst og seta tey upp aftur, tá arbeiðið er liðugt, og tað nýtist ikki at taka langa tíð. Kostnaðurin av tí arbeiðinum verður millum trý og fýra hundrað túsund krónur, sigur formaðurin í vinnurekandi grunninum."** (Vert at hava í huga, um vitið kundi runnið við til at skipað eitt sindur um uppá Tórsvøll fram móti hansara upprunaliga endamáli í staðin fyri at fyrigykla við einari utopiskari loysn)

Sosialurin 14. apríl 1999: Poul Michelsen: ..." **Tað er ov seint at broyta ætlanina nú ...**"

(Talan var ikki um nakra broyting, heldur at halda fast við eina politiska samtykt. Stadionætlan í Gundadali hevði tá bíðað í meira enn hálvthundrað ár, so at einar tvær vikur aftrat gjørdu ikki tann sóra munin, so mikið meira sum at tað ikki var talan um nakran týðandi dyst fyrr enn út á heystið)

Við støði í hesum sitatum nú mín seinasti spurningur til Poul Michelsen: **Leggi eg teg við órættum undir at hava ført óerliga talu yvir fyri almenninginum um tínar ætlanir á Tórsvølli?**

### Utopiskar visiónir heldur enn skilagóða loysn í Gundadali?

Í endanum í sínum seinna greinastubba ber Poul Michelsen m.a. fram, "*at tað er rætt, at frælsi ítrótturin fær sítt egna øki.*" Spurningurin hvar slíkt øki er at finna í býnum hevur ofta verið frammi, og nú herfyri hoyrdist í útvarpinum, at teir sakkønu í býráðnum mæltu til at gera atletikkstadion hinumegin ringvegin við Svimjihøllina.

Fagur tónleikur í oyrunum á øllum ítróttahugaðum! - men uttan at vilja sáa iva um sakkunnleikan, so vita øll, at tað er sera vindhart upp á Hálsi, og at heilt serligar atgerðir skulu til, skal slíkur ítróttavøllur gerast nýtiligur. Tí mugu vit spyrja: Er tað realistiskt og skilagott hjá Havnar býi at fullføra eitt marglætis fótbóltsstadion, sum als ikki gagnar føroyskum fótbólti samsvarandi, og byggja eitt mestsum innandura atletikkstadion fyri fleirfaldað tað, sum tað higartil ikki hava verið ráð til, í staðin fyri við munandi minni íløgu at laga viðurskiftini í Gundadali aftur til felags gagn?

Her at enda skal her dentur verða lagdur á, at eg seti meg ikki soleiðis at skriva bert fyri at tríva aftur í fortíðina ella fyri at kasta skarn á nakað. Nei, heldur er tað mítt ynniliga ynski at kunna gera mítt til at vekja til umhugsni, áðrenn endaliga ov seint er.

Góðar og fjølbroyttar ítróttaumstøður eru av stórum samfelagsligum týdningi bæði fyri fólkaheilsuna og fyri tjóðskaparliga medvitið og samleikan. Á Oyggjaleikum hava vit fleiri upplivað gleðina og stoltleikan ikki minst hjá vertsfólkunum, tá tað gekk væl hjá teirra ungfólkum og sigursflaggið varð vundið á stong. Innímillum hevur tann føroyska røddin eisini verið at hoyra úti á leikvøllum; men serliga eftir dystir, har vit við venjingarumstøðum eru á hædd við hini sum á fimleikagólvi, í svimjihylum og í bólthøllum, situr tann føroyski fagnaðarrómurin enn í oyrum.

Á vitjan í Noregi seinasta summar hevði eg aftur sum í ungum árum høvi at uppliva stevnuhald, har eisini tíggjutals børn og ungdómar fródliga kappaðust í lopum, køstum og renning, meðan avvarðandi og onnur áhugað við spenningi fylgdu við. Mær datt í huga, at slíkt hevði okkara evnagóði ungdómur eisini havt uppiborið.

*Tí er tað mín vón, at steðgað verður á, og at kommunu- og landspolitikarar saman við breiðum umboð fyri føroyskt frítíðar- og ítróttalív í felag seta út í kortið, hvat ið veruliga tænir høvuðsstaðnum og tjóðini best í hesum máli.*

Eg vænti mær svar frá Poul Michelsen upp á mínar spurningar.

*Framhald av síðu 10*

ur. Tann skaðin bøtist ikki aftur.

Vit hava bæði 1. valda býráðslimin og Kollafjarðarnevndina, men tað tykist, sum tey einki hava at siga í hesum máli.

Eg veit, at fólk frá hond hava klagað til býráðið um hesi viðurskifti, men tað er sum at sletta vatn á gás. Heitt verður tí enn einaferð á býráðið, um at fáa hesi mistøkini í Kollafirði rættaði og biðið verður eisini um at farið verður skynsamari fram.